

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 11 - 2011

# Beinleiðis netframløga frá Atlantic Petroleum

Í sambandi við at Atlantic Petroleum almannakunnger úrslitið fyri triðja ársfjórðing 2011 verður beinleiðis netframløga mikudagin 2. november kl. 13 - 00 føroyska tíð. Høvið verður eisini at ringja inn og seta spurningar beinleiðis. Um fólk ynskja at hyggja eftir beinleiðis framløguni, kunnu tey fara inn á heimasíðuna www.petroleum.fo <http - //www.petroleum.fo> stutt áðrenn byrjan og velja Live webcast, ið liggur á forsíðuni. Ynskir man bert at lurta eftir framløguni ígjøgnum telefon, ella vil man hava møguleika fyri at seta spurningar kann ringjast til tlf 0045 701 404 53, áðrenn framløgan byrjar. Framløgan verður seinni løgd á heimasíðuna hjá Atlantic Petroleum undir Investor Relations/Presentations & Webcasts/. Her ber eisini til at síggja eldri framløgur hjá felagnum. Neyðugt er at hava Adobe Flash Player á telduni. Forritið kann takast niður her - http - //get.adobe.com/flashplayer/ <http - //get.adobe.com/flashplayer/> Mynd Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum uttan fyri høvuðssæti hjá felagnum í Havn. Mynd Oljan.fo/Jan Müller